Tey minnast tí›ina eftir ræ›uliga húsagangin í 1990:

Fólk flentu at okkum

Fyri 10 árum sí›ani mistu tey alt, tey høvdu strítt fyri, tá fyritøkan hjá teimum fór á heysin. Sí›ani hava tey arbeitt seg upp aftur, og í morgin lata tey upp í stórum n‡bygdum handilshúsum í Havn. Mynd: Jens Kristian Vang

Fyri 10 árum sí›ani gjørdi fólk gjøldu burtur úr teimum, tá tey seldu jólatrø á gøtuni í Havn. Nú hava tey strítt seg á føtur aftur, og í morgin lata Idé Møblar upp í n‡ggjum og stórum handilsbygningi á Hálsi í Havn

COMEBACK

Ey›un Klakstein

Hvussu kann ta› bera til?

Ta› tykist ver›a ein vanligur spurningur, tá fólk frætta tí›indini um, at í morgin lata Idé Møblar upp í n‡bygdum og stásiligum handilsbygningi á Hálsi í Havn.

Í 1990 fóru Idé Møblar á húsagang vi› stórum braki, bara tvey ár eftir at fyritøkan flutti inn í risastór handilshøli, sum vóru bygd fyri 40 milliónir krónur.

Fólkini aftan fyri Idé Møblar – nú sum tá – eru hjúnini Birgir og Elsebeth Andreasen.

Teirra fyritøka fór á heysin í fyri 10 árum sí›ani, men eins og fuglurin Føniks reis úr øskuni, hava tey klára at fóta sær aftur, og nú bjó›a tey vi›skiftafólkum sínum inn í n‡ggjan bygning upp á gó›ar 4000 fermetrar, har alskyns innbúgv fæst til keyps.

Birgir minnist enn, hvussu fólk gjørdu gjøldur burtur úr honum, eftir at Idé Møblar fóru á húsagang í oktober mána›i í 1990, men hann gavst ikki á hondum.

Sí›ani hevur hann stillisliga arbeitt seg upp aftur, og tá hann leygarmorgunin kann lata hur›arnar upp á ví›an vegg í n‡ggju handilshølunum, er ta› samstundis ein stórsigur hjá familjuni og fyritøkuni.

Fekk ókeypis kovboybuskir

Søgan um møblasøluhjúnini Birgir og Elsebeth Andreasen byrjar fyri 22 árum sí›ani.

Tá fekk Elsebeth hugskoti› til at fara undir at selja møblar. Birgir hev›i tá matvøruhandil, sum hann sí›ani gavst vi›.

Sí›ani byrjanina hava tey samstarva› vi› Idé Møblar í Danmark, og ta› gera tey framvegis.

Í 1979 leiga›u tey seg inn í høli í Havnini, og næstu árini gekk ta› stø›ugt fram á hjá fyritøkuni. Í 1983 bygdu Idé Møblar síni egnu høli á Hálsi, men eisini teir 2200 fermetrarnir gjørdust eftir nøkur ár ov fáir.

Í 1988 var› nógv gjørt burtur úr, tá n‡ggi risastóri handilsbygningurin upp á fleiri enn 7000 fermetrar stó› klárur at h‡sa Idé Møblum. Bygningurin var ein av teimum heilt stóru handilsbygningunum í landinum, og fyrstu tí›ina gekk væl.

– Men so fór kreppan at gera um seg, og eftir stuttari tí› mistu vit okkurt um helmingin av umsetningin-um. Ta› tók beinini undan fyritøkuni, og í 1990 fóru vit á húsagang, grei›ir Birgir frá.

– Ta› var ómetaliga svárt, tí vit mistu alt, sum vit høvdu strí›st fyri øll árini. Eg kann samanlíkna ta› vi› sorgina, tá tú missir ein, sum stendur tær nær, sigur Elsebeth.

Stóra skrædli› hev›i vi› sær, at nógvar fyritøkur mistu pengar, tá Idé Møblar fóru á heysin.

– Í eini konkursstø›u eru ta› altí› nógv, sum missa pengar, men solei›is var stø›an í Føroyum tá. Vit vóru kanska tey fyrstu, sum fóru á húsagang, men næstu árini gjørdist ta› púra vanligt, at fyritøkur fóru á heysin, tí kreppan gjørdist so svár.

– Ta›, sum vit hava gjørt, sí›ani vit komu í gongd aftur, hevur veri›, at vit hava roynt at keypt frá somu fyritøkum, sum mistu pengar upp á okkum tá í 1990, sigur Birgir.

Fólk flentu

Ta› var stórt umskifti hjá hjúnunum at fara av aldukambinum og ni›ur í aldudalin eftir stuttari tí›.

– Eg minnist, at eg stutt eftir húsagangin fór inn til Hans Joensen at keypa mær eina kovboybuksir, tí eg átti ongar slíkar. Eg minnist, at eg fann einar, sum kosta›u 148 krónur, men tá eg skuldi gjalda fyri tær, vildi Hans ikki taka pengar fyri tær, men gav mær tær ókeypis, grei›ir Birgir frá.

Keypi› av kovboybuksunum sigur søguna um stjóran, sum má í arbei›sklæ›ini fyri at fáa alt at hanga saman.

– Eftir at vit høvdu mist fyritøkuna, hugsa›u vit um, hvat vit skuldu finna upp á. Eg hev›i ongan hug at uppgeva tankan um at ver›a sjálvstø›ugur og fáa mær eitt arbei›i. Eg haldi ikki, at eg eri egna›ur til ta›. So vit byrja›u vi› at fara at selja jólatrø á jólum í 1990, sigur Birgir.

Ta› var ikki minst, tá familjan stó› á gøtuni og seldi jólatrø, at ta› gekk upp fyri teimum, at stø›an var nógv broytt, sí›ani tey tvey ár framman undan fluttu inn í stóru handilshølini á Hálsi.

– Ta› var ræ›uliga hart at byrja aftur av n‡ggjum. Nógv fólk høvdu hug at gera gjøldur burtur úr okkum, tí vit vóru farin at selja jólatrø, og ta› vóru tey, sum veruliga flentu at mær, minnist Birgir.

Men sølan av okkurt um 1000 jólatrøum kom væl vi›, og ta› vóru eisini nógv, sum høvdu samkenslu vi›

familjuni.

– Eldra dóttir okkara stó› og seldi jólatrø, tá ein gomul kona, sum hev›i keypt sær eitt træ, spurdi um sølan var fyri okkurt vælgerandi endamál. Dóttirin svara›i, at ta› var fyri Birgir Andreasen, og tá svara›i konan, at so skuldi hon hava eitt jólatræ afturat, tí ta› var sanniliga til eitt gott endamál, fortelir Birgir.

At summi fólk høvdu hug at gera gjøldur burtur úr familjuni og flenna eftir teimum, heldur Birgir kann hava veri› vi›virkandi til, at hann vildi strí›a seg aftur á føtur sum handilsma›ur.

Mostirin kautionera›i

Longu hálvt ár eftir húsagangin fóru Birgir og Elsebeth aftur í holt vi› at selja møblar.

– Vit hildu, at ta› var ta›, sum vit dugdu best. Birgir hugsa›i onkuntí› um, at vit skuldu skifta bransju, men vit vóru samd um, at vit kendu best til møblasølu, og tí høvdu vit hug til at fara í gongd aftur vi› ta›, sigur Elsebeth.

Tá Idé Møblar fóru á heysin í 1990 mistu Birgir og Elsebeth alt ta›, tey áttu, og nógvar fyritøkur mistu eisini pengar.

– Men Idé Møblar í D anmark skunda›u undir okkum fyri at fara í gongd aftur, og tá mostir mín kautionera›i fyri einum láni til partapening í eini n‡ggjari fyritøku, fóru vit at hugsa um eina møblahandil. Fossbankin játta›i at fíggja okkum, og hesi bæ›i vi›urskiftini gjørdu, at vit kundu koma í gongd aftur vi› at selja møblar, grei›ir Birgir frá.

Tey leiga›u seg inn í ein bygning hjá Johannes Berg á Hálsi, og frá fyrsta degi gekk væl vi› søluni.

– Vit stúrdu fyri, at fólk ikki fóru at koma at keypa frá okkum aftur, men tann óttin var› púra ógrunda›ur, tí fólk tóku væl undir vi› n‡ggja handlinum, sigur Birgir.

Men hóast n‡ggja fyritøkan kom væl frá byrjan, var ta› eitt rættiligt slag í andliti›, at Fossbankin mátti lata aftur á heysti› 1992.

– Tá ridla›i fyritøkan aftur, tí vit høvdu mist okkara fíggingarstovn, men Føroya Sparikassi tók yvir, og ta› gjørdi, at vit kundu halda fram vi› handlinum, sigur Birgir.

Ø›rvísi umstø›ur hesafer›

Sí›ani 1991 hava Birgir og Elsebeth vunni› sær pengar av møblasøluni, og tey hava eisini gjørt onkrar skilagó›ar íløgur, sum hava havt vi› sær, at nú n‡ggi bygningurin er bygdur, hava tey longu goldi› helvtina av kostna›inum.

Í 1995 keyptu tey øki›, har n‡ggi bygningurin stendur, og ta›, sum tey goldu fyri øki›, hava tey vunni› inn aftur vi› at leiga ta› út til parkeringspláss hjá ø›rum fyritøkum á Hálsi.

Tey keyptu eisini fasta ogn, sum tey seinnu seldu aftur vi› fittum vinningi, og pengarnar frá møblasøluni og íløgunum í føstu ognini hevur gjørt, at tey hava veri› før fyri at gjalda helvtina av n‡ggja bygningum beinanvegin. Hina helvtina av upphæddini fíggjar Føroya Sparikassi.

Tey vilja ikki siga, hvussu nógv n‡ggi bygningurin kostar, og hóast ta› er nógv minni enn tann í 1988, so er talan um trivaliga milliónaupphædd.

– At vit hava veri› før fyri at gjalda helvtina av kostna›inum beinanvegin ger, at treytirnar eru heilt ø›rvísi hesafer›, enn tá vit bygdu í 1988, og tí stúri eg ikki fyri at koma í somu stø›u aftur. Tú kanst ongantí› siga naka› vi› vissu um búskapin, men í løtuni eru útlitini gó›, og ta› gevur okkum eisini sjálvandi mót til at flyta inn í n‡ggja bygingin, sigur Birgir.

– Vit hava eisini gó› og loyal stavsfólk, og uttan tey hev›i hetta heldur ikki bori› til. Tey hava gjørt eitt stórt arbei›i.

Birgir og Elsebeth leggja stóran dent á, at tey eru saman um at reka handilin, og ta› hava tey alla tí›ina veri›.

– Vit hava veri› ígjøgnum alt saman – bæ›i ta› gó›a og ta› ringa. Alt gerst nógv lættari, tá tú kanst vera saman um ta›. Ta› hev›i ikki bori› til hjá okkum, hvør í sínum lagi at arbeitt so nógv, sum vit gera, men tá vit nú bæ›i brenna fyri tí sama, so letur ta› seg gera, sigur Birgir.

Birgir og Elsebeth eiga tvær døtur. Joan, sum er 19 ára gomul, og Beinta sum er 10 ára gomul. Hon kom í ver›ina, júst sum Idé fór á heystin í 1990.

– Hon gjørdi truplu stø›una, sum vit vóru komin í, nógv lættari, sigur mamman og smílist.

Og nú royna tey aftur at flyta fyritøkuna í ein stóran og n‡mótans handilsbygning.

Familjan og fyritøkan hava sanniliga fóta› sær.

- At vit hava veri› før fyri at gjalda helvtina av kostna›inum beinanvegin ger, at treytirnar eru heilt ø›rvísi hesafer›, enn tá vit bygdu í 1988, og tí stúra vit ikki fyri at koma í somu stø›u aftur, siga hjúnini Birgir og Elsebeth Andreasen. Mynd: Jens Kristian Vang

Kennir einki til atfinningarnar

Jógvan Andreasen heldur, at forma›urin í Starvsmannafelagnum skal koma vi› ítøkiligum dømum fyri sínum atfinningum, tí hann sigur seg einki kenna til hesar atfinningar

LØGTINGSINS UMBO‹SMA›UR

Ey›un Klakstein

– Eg kann als ikki fyrihalda meg til atfinningarnar frá formanninum í Starvsmannafelagnum, tí eg kenni einki til tær.

Hetta sigur sorinskrivarin og komandi umbo›sma›urin hjá løgtinginum.

– Eg kenni ta› sum eina generella útspilling av mær, og ta› sum harmar meg mest er, at ta› rakar mítt núverandi starv sum dómari, sigur Jógvan Andreasen.

Forma›urin í Starvsmannafelagnum hevur funnist at valinum av Jógvani Andreasen sum Løgtingsins Umbo›smanni, tí felagi› sigur seg ikki hava fult álit á honum.

– Eg veit meg ikki hava gjørt nakran órætt móti fakfeløgunum, og tí haldi eg, at Gunnleivur Dalsgar› skal koma vi› onkrum dømum fyri tí, sum hann hevur at finnast at. Annars



- Eg kann als ikki fyrihalda meg til atfinningarnar frá formanninum í Starvsmannafelagnum, tí eg kenni einki til tær, sigur Jógvan Andreasen, koamdi umbo›sma›ur hjá løgtinginum

kann eg als ikki fyrihalda meg til atfinningarnar, sigur sorinskrivarin.

Ov bíligt

Jógvan Andreasen vísir á, at ta› ber til at kjakast um ein dóm, sum er sagdur, men so ber eisini til at fara ví›ari vi› málinum.

– Ta› er ov bíligt av formanninum í Starvsmannafelagnum bara at sleingja um seg vi› leysum póstandum um, at eg skal hava gjørt reglur á danska arbei›smarkna›inum til rættarsi›venju í Føroyum. Eg haldi, at hann skuldi komi vi› onkrum ítøkiligum dømi um hetta, sigur Jógvan Andreasen.

Fakfeløg hava eisini funnist at, at ein 67 ára gamal ma›ur er settur í starvi sum Løgtingsins Umbo›sma›ur.

– Fyrst er at siga, at eg havi ikki søkt starvi›, men havi fingi› ta› bo›i›. Og eitt ta› fyrsta eg sjálvur hugsa›i var, at eg var komin so langt upp í árini, at eg var farin at hugsa um at leggja frá mær sum dómari. Men eg havi so avgjørt, at eg vil taka av avbjó›ingini sum umbo›sma›ur hjá løgtinginum, sigur Jógvan Andreasen.

Fakfeløgini ikki á einum máli

Forma›urin í Føroya Arbei›arafelag er misnøgd vi› vali› av Løgtingsins Umbo›smanni, me›an forma›urin í Fiskimannafelagnum ikki vil finnast at valinum

LØGTINGSINS UMBO‹SMA‹UR

Ey›un Klakstein

Føroysku fakfeløgini eru ikki á einum máli um vali› at seta Jógvan Andreasen, sorinskrivara, í starvi› sum Løgtingsins Umbo›sma›ur.

Gunnleivur Dalsgar›, forma›ur í Starvsmannafelagnum, sigur seg ikki hava fult álit á Jógvani Andreasen, tí felagi› heldur, at me›an hann hevur veri› sorinskrivari eru reglur á danska arbei›smarkna›inum gjørdar til rættarsi›venju í Føroyum, hóast hesar reglur ikki eru galdandi her.

Forma›urin í Føroya Arbei›arafelag finnist eisini at valinum til Umbo›smannin hjá løgtinginum.

– Eg skilji ikki, at løgtingi› setir ein umbo›smann, sum er 67 ára gamal. Fólk, sum nærkast pensjónsaldrinum, hava ikki somu arbei›sorku og megi sum eitt fólk í besta aldri, sigur Ingeborg Vinther.

– Sum fakfelagsfólk ivist eg eisini í rættleikanum at seta ein dómara í starvi›. Eg havi kent á mær, at Jógvan Andreasen hevur ikki veri› rættvísur mótvegis fakfelagsrørsluni. Eg havi hildi› hann veri› partískan mótvegis fakfeløgum, og tí eri eg ikki fegin um vali›, sigur forma›urin í Føroya Arbei›arafelag.

Einki at finnast at

Forma›urin í Føroya Fiskimannafelag heldur onga orsøk ver›a til at finnast at manninum, sum er settur í starv sum Løgtingsins Umbo›sma›ur.

– Ta› ber illa til at siga, at hatta er eitt vánaligt val, men kanska er ta› eitt dømi um, at vit hava avmarka› úrval av fólki til starvi. Hóast eg gjøgnum árini ikki altí› havi veri› nøgdur vi› dómarnar hjá Jógvan Andreasen, haldi eg ikki, at eg kann finnast at valinum av honum sum Løgtingsins Umbo›smann, sigur Óli Jacobsen.

– Ta› hevur veri› funnist at honum, at hann hevur gjørt reglur á danska arbei›smarkna›inum til rættarsi›venju í Føroyum, men haldi eg bara ver›a eitt pluss fyri mannin. Er ta› naka›, sum vit tørva í Føroyum, so er ta› donsku rættaruppfatan.

– Eg rokni eisini vi›, at vir›ingin, sum er fyri Jógvani Andreasen, fer at hjálpa honum í at fáa n‡ggja Umbo›smannin at virka, heldur forma›urin í Føroya Fiskimannafelag.